
tíðindablaðið

sosialurin

5 ferðir um vikuna

Atli Dam um samgongufyrireiking:

Einki at bíða eftir

Stór-sigur

Finnbogi Ísakson:

Lyftini telja meira enn politikkurin

Jógvan Sundstein:

Vit høvdu eitt gott val

Persónligu atkvøðutølini

*Nógv vatn er runnið í ánna, síðani Atli Dam á forsíðuni í Sosialinum dagin eftir løgtingsvalið í november 1990 kundi fegnast um tíggju tinglimir og 27,5 prosent av atkvøðunum. Fýra ár seinni fór flokkurin niður í helvt, og sambært seinastu veljarakanningini er flokkurin í einum nýggjum aldudali, sum fær tankarnar aftur til niðurtúrin í 1994*

hvat tað merkir at vera sosialdemokratur í 21. øld. Flokkurin hevur í ein mun mist tilknýtið til siðbundnu veljararnar, eins og sosialdemokratar í londunum kring okkum, uttan at draga nýggjar veljarar til sín, sigur Jógvan Mørkøre.

## Millum loysing og samband

Ein annar spurningur, sum hevur plágað Javnaðarflokkin, er spurningurin um loysing ella samband. Ikki minst síðani 1998, tá Høgni Hoydal tvífaldaði tingmanningina hjá Tjóðveldi og lanseraði eina skipaða strategi fyri føroyskum fullveldi.

Síðani 1998 hava Tjóðveldi og Sambandið verið størstu flokkarnir, meðan Javnaðarflokkurin hevur tvíhildið um, at ríkisrættarligi spurningurin er sekunderur í mun til ta primera prosjektið, sum er at varðveita og útbyggja vælferðarsamfelagið.

Men sambært Jógvani Mørkøre skyldast afturgongdin hjá Javnaðarflokkinum eisini, at flokkurin er vorðin gruggutur í ríkisrættarliga spurninginum.

– Heilhjartaði stuðulin til heimastýrisskipanina eyðkendi í ártíggjur Javnaðarflokkin. Heimastýrislógin varð uppfatað sum ein sosial kontrakt ímillum føroyingar og danir, og hetta vann Javnaðarflokkurin uppá. Men seinnu árini er støða floksins vorðin kámari í hesum spurninginum, metir stjórnmálafrøðingurin.

Sambært Jógvani er nógv vatn runnið í ánna, síðani gamli floksleiðarin Petur Mohr Dam kallaði heimastýrislógina fyri eitt "frælsisbræv". Partar av flokkinum hava seinnu árini luftað tankan um økt sjálvstýri, um blokkniðurskurð og um at tøma heimastýrislógina. Og í undanfarnu CHE samgongu góðtók flokkurin ein blokkniðurskurð á 119 milliónum krónur í samgonguskjalinum, sum kortini ongantíð bleiv veruleiki, tí samgongan slitnaði.

– Við slíkum útmeldingum verður hurðin latin upp á víðan vegg til Sambandið. Og seinasta veljarakanningin gevur eisini ábendingar um, at Javnaðarflokkurin missir til Sambandið, sigur Jógvan Mørkøre, sum eisini eftirlýsir eitt greiðari útspæl í mun til spurningin um ES.

Øssur Winthereig tekur undir við hesi eygleiðing. Hann metir, at Javnaðarflokkurin ikki er komin fyri seg eftir ríkisrættarligu polariseringina, sum byrjaði við fullveldislandsstýrinum.

– Sum formaðurin ofta hevur sagt, so endaði flokkurin ímillum tveir stólar. Flokkurin royndi so at breiðka afturpartin og sita á báðum stólunum í senn, tó mest á sambandsstólinum. Men hóast polariseringin ikki er eins stór longur, hevur flokkurin enn ikki funnið sín egna stól at sita á, heldur Øssur Winthereig.

Men fyrrverandi ráðgevin hjá Javnaðarflokkinum, Flóvin Eidesgaard, metir ikki, at dominerandi stríðið ímillum Sambandið og Tjóðveldi er ein umbering fyri vánaligu úrslitini.

– Trupulleikin er, at Javnaðarflokkurin ikki hevur megnað at seta dagsskránna og fáa valini at snúgva seg um annað enn loysing og samband. Avbjóðingin í einum valstríði er júst at fáa fólk at býta seg upp eftir kriterium, sum gagna flokkinum, sigur Flóvin Eidesgaard.

## Fíggjarmál tyngja

Fyrrverandi ráðgevin er ikki fegin um støðuna hjá flokkinum. Stóri trupulleikin er sambært honum, at politikkurin hjá Javnaðarflokkinum er ósjónligur. Partvís orsakað av vánaligum søluarbeiði, men eisini av teirri orsøk, at veruligur politikkur heilt einfalt manglar.

– Flokkurin hevur nøkur hugsjónarlig slagorð at føra seg fram við, men politikkurin er ikki søluklárur. Hann er ikki liðugur til at selja. Sum ein so beinrakið skrivaði á Facebook ein dagin: "Meiningakanningar vísa, at flokkar sum hava meiningar ganga fram", sigur Flóvin Eidesgaard.

Sambært Flóvini hevur manglandi politikkurin gjørt tað ov lætt hjá hinum flokkunum at trumla Javnaðarflokkin niður, tá samráðingar eru. Og eftir standa javnaðarpolitikkarar og verja politiskar semjur uttan at siga, hvat flokkurin heldur vildi havt.

– Og so má leiðslan út at biðja um forstáilsi frá veljarunum, tá flokkurin ikki megnar at levera tað, sum veljarin væntar av flokkinum, sigur Flóvin Eidesgaard.

So harður er skrivarin hjá Javnaðarflokkinum frá 1990 til 2000, Eyðálvur Dimon, ikki. Trupulleikin er sambært honum ikki, at flokkurin manglar politikk, men at flokkurin ikki megnar at seta dagsskránna í fjølmiðlunum.

– Vit hoyra t.d. lítið um framstigini á heilsuøkinum. Vit hoyra lítið um eykatímarnar í byrjunarundirvísingini í fólkaskúlanum. Vit hoyra lítið um, at Samhaldsfasti er hækkaður. Men vit hoyra øgiliga nógv um skattalættar til tey ríku og nú um at mótrokna frá fyrstu krónu í pensjónsreforminum. Hóast tað var Rósa Samuelsen, sum átti hetta uppskotið, so er tað Jóannes Eidesgaard, sum skal út at verja seg, sigur Eyðálvur Dimon.

Fyrrverandi skrivarin heldur tað vera eitt stórt mistak, at Jóannes Eidesgaard gjørdist fíggjarmálaráðharri. Í staðin fyri at sterkasta kortið var í tinginum og tosaði javnaðarpolitikk, so er hansara leiklutur nú vorðin at halda saman uppá samgonguna og at verja ópopulerar sparingar.

Og hesum tekur Øssur Winthereig undir við.

– Javnaðarflokkurin hevur telvað seg í ta mótsigandi støðu, at flokkurin tók fíggjarmál og læt Sambandsflokkinum sosialmál ella almannamál. Rósa Samuelsen kann nú ferð eftir ferð siga, at tað er formaðurin í Javnaðarflokkinum, sum setir henni krøv um sparingar á sosiala økinum. Og tá er næstan ógjørligt at standa sum garanturin fyri vælferð og sosialum tryggleika, sigur Øssur Winthereig.

Umframt hetta kunnu spurnartekin setast við, hvussu smart tað er at vara av fíggjarmálum pluss tveimum útreiðslutungum málsøkjum afturat, mentamálum og heilsumálum. Tí meðan uppgávan hjá Jóannesi Eidesgaard er at halda aftur, hava Aksel Johannesen og Helena Dam á Neystabø konstant brúk fyri pengum. Tá er skjótt, at flokkurin kemur í stríð við seg sjálvan.

Í skrivandi stund er fíggjarlógin ikki farin til fyrstu viðgerð í tinginum, og fyrsta avbjóðingin hjá Javnaðarflokkinum verður at fáa eina fíggjarlóg í hús við árslok, sum ikki gongur teimum økjunum ov nær, sum javnaðarfólkini í landsstýrinum hava raðfest í fíggjarlógaruppskotinum hjá Eidesgaard. Hesi øki eru sambært Eidesgaard sjálvum skúlamál, heilsumál og almannamál.

Landsfundurin hjá Føroya Javnaðarflokki stendur nú fyri durum. Og tá er enn eitt høvi at kjakast um tvíeggjaða spurningin, sum er heitið á bók frá 2007 hjá bretska sosialdemokratinum Nick Cohen um evropeiska vinstravongin: *What´s left?*

*– Flokkurin er ikki komin fyri seg eftir ríkisrættarligu polariseringina*

*Øssur Winthereig, fyrrverandi politiskur journalistur*

*– Flokkurin hevur nøkur hugsjónarlig slagorð at føra seg fram við, men politikkurin er ikki søluklárur*

*Flóvin Eidesgaard, fyrrverandi ráðgevi*